Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Kárason Petersen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismann í heilsmálum

Evni: Sjálvstøðugur limaskapur í Norðurlandaráðnum

Spurningar:

1. Er gongd í málinum um at tryggja Føroyum sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum?
2. Lúka Føroyar formligu treytirnar fyri limaskapi í Norðurlandaráðnum?
3. Um ikki, hvør er forðingin fyri at Føroyar kunnu gerast sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum?
4. Nær kunnu vit vænta, at Føroyar verða sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum?

Viðmerkingar:
Síðani norðurlendska samstarvið formliga varð skipað í 1952 við Helsingforssáttmálanum, ið er grundarlag fyri Norðurlandaráðnum, hevur tað verið eitt brennandi ynski frá politiska myndugleikanum í Føroyum um at luttaka í Norðurlandaráðnum sum ein sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum, á jøvnum føti við hini Norðurlondini. Millum annað varð hetta ynskið einmælt samtykt á Løgtingi við løgtingssamtykt frá 1977 og 2003.

Føroyskir mynduleikar hava sent inn 4 umsóknir til Norðurlandaráðið um sjálvstøðugan føroyskan limaskap. Fyrstu ferð í 1976, aðru ferð í 1980, triðju ferð í 2003 og seinasta umsóknin varð latin inn í 2016. Svarið frá formansskapinum í Norðurlandaráðnum til seinastu umsóknina var noktandi, og mælti formansskapurin til ikki at fara víðari við føroysku umsóknini.

Grundgevingin fyri at sýta umsóknina var, at tað í fyrsta umfari er talan um ein spurning millum Føroyar og Danmark, sigur formansskapurin hjá Norðurlandaráðnum.

Í samgonguskjalinum hjá verandi samgongu stendur, at umboðanin í fleirtjóða og altjóða felagsskapum verður styrkt, og at arbeitt verður fyri sjálvstøðugum limaskapi í Norðurlandaráðnum. Tí verður spurningurin settur.

Á Løgtingi, 20. apríl 2022

Bjarni Kárason Petersen